





elin@sosialurin.fo karim@sosialurin.fo jan@sosialurin.fo jonbrian@sosialurin.fo hersim@sosialurin.fo

# Skráin fyri Rás 2

## Heimamissiónin á Rás 2 á páskum



**Mikudagur 19. mars kl. 21.00**
Úr skjáttuni
Sangskaldið Lina Sandell - lív, lagna og lovsangir.
Heri Tróndheim leggur til rættis



**Skírisdag 20. mars kl. 17.00-18.00**
(endursend kl. 21.00)
Skíris- og páskaprát.
Tosað verður við ymsar persónar, hvussu teir halda páskir, um tiltøk á páskum, og um hvussu tað er at halda páskir í Ísrael.
Frants Jensen leggur til rættis.

**Langafríggjadag 21. mars kl. 17.00-18.00**
(endursend kl. 21.00)
Samrøða við Olgu Magnussen, Lamba.
Í samrøðuni greiðir Olga Magnussen frá barnaárum á Toftum, arbeiðið sum sjúkrarøktarfrøðingur, arbeiðið sum bóndakona í Lamba, og arbeiðinum sum leiðari á Blákrossheiminum. Heri Tróndheim leggur til rættis.



**2. páskadag 24. mars kl. 14.00-15.00**
(endursend kl. 19.00)
Samrøða við Thurid og Snorra Brend (2. partur) Prátað verður við hjúnini um teirra lív, og serliga um tíðina áðrenn tey fóru til Mali sum trúboðarar og meðan tey vóru í hesum afrikanska landinum.
Maja Jakobsen og Sólrun Poulsen leggja til rættis.



**Páskadag 23. mars kl. 14.00-15.00**
(endursend kl. 19.00)
Samrøða við Thurid og Snorra Brend (1. partur)
Prátað verður við hjúnini um teirra lív, og serliga um tíðina áðrenn tey fóru til Mali sum trúboðarar, og meðan tey vóru í hesum afrikanska landinum.
Maja Jakobsen og Sólrun Poulsen leggja til rættis.

## Evengeliska Røddin á Rás 2 á páskum



Jógvan Zacharriassen

**Skírisdag 20. mars Kl. 14-15**
(endursend kl.19)
Orð á leiðini
Hvussu Jesus myndar heimssøguna.
Jógvan Zacharriassen leggur til rættis

**Langafríggjadag 21. mars Kl. 14-15**
(endursend kl.19).
Orð á leiðini
Jesus, hví mátti hann doyggja.
Jógvan Zacharriassen leggur til rættis

**Kelduvaðið páskinar 2008**
Sunnumorgun, páskamorgun er ikki triðji dagur eftir Langa fríggjadag. Doyði Jesus so Langa fríggjadag? Hesum fara vit at hyggja nærri at í sendingini hesuferð. Eisini fer Osvald Kjærbo at hava ein stuttan boðskap til okkara. Yvirskriftin hjá honum hesuferð er "Vit vildu fegin sæð Jesus". Afturat hesum hava vit nakað av tónleiki á skránni.



Eirikur Norðberg

**Kelduvaðið 1. páskadag kl. 21**
Í sendingini 2. páskadag kemur Jógvan Páll Sevdal at hava ein boðskap. Afturat tí verður nakað av tónleiki. Tað er Eli J. Christiansen ið leggur til rættis.

**Kelduvaðið 2. páskadag kl. 16**
endursend kl. 21

eydna@ras2.fo eydun@ras2.fo eydfinn@ras2.fo james@ras2.fo mirjam@ras2.fo elinh@ras2.fo







TÓRSGØTA 1 FO-100 TÓRSHAVN TEL 35 99 99 RAS2@RAS2.FO